

# Sama manning á brúnni í Oljuvinnufelagnum

**Jan Müller**

16.06.2014 - 21:04

Oljan.fo

Limirnir í Oljuvinnufelagnum eru eftir øllum at døma nøgdir við manningina á brúnni í felagnum. Týsdagin 10. juni hevði Oljuvinnufelagið ársaðalfund og øll nevndin varð afturvald.

Í nevndini fyri Oljuvinnufelagið sita Gunnbjørn Joensen, Anja Jacobsen, Eli Lassen, Magni Arge og Jostein Petersen. Christian Danielsen er tiltakslimur.

Nevndin hevur skipað seg við Magna Arge sum formanni og Gunnbjørn Joensen sum næstformanni.

Oljuvinnufelagið arbeiðir fram móti at geva føroyskum fyritøkum møguleikar í oljuvinnuni. Málið er at styrkja føroysku fyritøkurnar við at menna og betra um teirra førleikar.

Oljuvinnufelagið varð sett á stovn í 2001. Bert fyritøkur kunnu gerast limir. Endamálið við felagnum er „at savna allar fyritøkur, ið virka innan oljuvinnu til at útinna felags áhugamál og at verja áhugamál limanna," stendur í viðtøkunum hjá felagnum, sum er partur av Vinnuhúsinum.

Oljuvinnufelagið hevur samband við oljufeløg, myndugleikar og politisku skipanina.

Felagið hevur skrivstovu í Vinnuhúsinum.